# Funnu gamla granat



*Mynd: Umborð á hesum bátinum lá ein 40 cm. long granat hósdagin. Teir vóru í holt við at dýpa við eystaru bryggju, tá teir fingu fatur á óbodna gestinum.*

**Arbeiðið við at dýpa við eystaru bryggju í Havn verður í heilum seinkað av, at menn finna gomul spreingilóður frá seinna heimsbardaga. Hósdagin var tað ein gomul granat, og nú verður umhugsað at gera eina umfatandi reinsing av økinum**

SPREINGING
*Heri á Rógvi*

Seinnapartin hósdagin funnu menn frá J&K Petersen eina granat, meðan teir arbeiddu við at dýpa við eystaru bryggju í Havn. Hetta er kortini ikki fyrstu ferð, at hetta kemur fyri, og teir eru alt annað enn fegnir um, at teir skulu steðga arbeiðinum, og bíða til hetta kann fáast av vegnum. Vit hava tó gott tol, siga teir.

Hósdagin var talan um eina granat frá seinna heimsbardaga. Talan var um eina sokallaða »luftværns« granat, ið ikki eru ókend um okkara leiðir sum rest frá kríggsárunum í fjørutunum.

Teir, ið funnu granatina, boðaðu løgregluni frá, og teir beindu so boðini víðari til Færøernes Kommando. Fyrsta stigið var at fáa økið avsperrað. Síðani komu menn frá Færøernes Kommando á staðið. Sigast skal, at granatin var einar 40 cm. long, og brennirørið var enn heilt.

Hans Jensen, orlogskaptajn, sigur, at teir stundum uppliva tílíkt, og granatir frá seinna heimsbardaga eru rættiliga vanligar, har skip og annað hesa tíðina hava ligið. Eisini í Danmark nýta teir nógva orku upp á at fáa ruddað økir fyri tílíkum granatum og øðrum.

Hann sigur, at serkønir frá Færøernes í hesum og øðrum førum fara at kanna lutin, og teir gera so av, hvat skal gerast víðari. Alt tílíkt verður sprongt vanliga. Fyrst verður granatin koyrt í eitt serligt rúm hjá Færøernes Kommando til endamálið. Teir serkønu mettu ikki, at nakar vandi var á ferð við hesari granatini, og hon verður sprong einaferð seinni, tá teir gera av við innbúgvið í serliga rúminum. Tað kemur fyri, at teir beinanvegin gera av at spreingja, men hildið var ikki, at hetta var neyðugt.

Hans Jensen sigur, at teir í samráð við Tórshavnar Havn í løtuni umhugsa møguleikan, at fáa serkønar kavarar at rudda arbeiðsøkið fyri vandamiklar spreingilutir. Støða er tó ikki tikin til hetta enn, men tað er givið, at tílík kostar pengar, tá neyðugt er at steðga arbeiðið.

Skuldi onkur koma fram á granatir ella líknandi, so eru ráðini at boða løgregluni frá hesum, sum síðani boðar avvarðandi myndugleika frá.

## Clickhaze til Stokhólm

### Fløga, heimasíða og konsertferð

TÍÐINDASKRIV

Clickhaze gevur fløgu út, sjósetur nýggja heimasíðu og fer á eina norðurlendska konsertferð, sum hevur til endamáls at marknaðarføra nýggju fløguna og bólkin Clickhaze sum heild í summar.

Heimasíðan verður løgd út 1. juni.

2. juni er ein útikonsert í miðbýnum í Stockholm, har Clickhaze er boðið at vera við til at hátíðarhalda 750 ára dagin fyri býin. Clickhaze spæla á Norrmalmstorg mitt í Stockholm kl 16.00.

Útgávan av fyrstu fløguni hjá Clickhaze verður hin 14. juni. Um kvødlið hin 14. spæla Clickhaze útikonsert í Runavík. Eisini vera nakrar konsertir hildnar kring landið eftir at fløgan er komin. M.a. í Klaksvík og Havn.

Síðani standa Roskilde, Midtfyns- og Nibefestivalarnir fyri tørni. Hetta er ein gyltur møguleiki hjá Clickhaze at fáa tónleikin fram í ljósið í norðurlondum.

Roskilde Festival 26. juni – Camping Scenen; Nibe Festival 27. juni – Måneskinsteltet; Midtfyns Festival 4. Juli – Beach Club.

Harafturat skulu Clickhaze til Grønlands at spæla á Niipiaa Rock festival í august. Umframt tey her nevndu tiltøk verður eitt tættpakkað program við framførslum gjøgnum alt summarið á bæði smærri og størri støðum í Føroyum og londunum kring okkum.

### Um Fløguna

Á fløguni verða 6 løg.

3 upptikin í Lundgaard Studio DK, Jak-zak Fo, UF studio 1 FO, og 3 løg upptikin live á prix føroyar finaluni 2001.

Studio upptøkurnar verða mixaðar av Óla Poulsen, live løgini av Finni Hansen. Løgini eru: Daylight, Skirvin Flá, Sorrig och Gledje, Frozen Lullaby, Notes from the underground, Indigo Brow. Tað er TUTL sum gevur út.

### Munadyggari fyrisiting

Clickhaze hava fyri stuttum síðani umskipað virksemið kring bólkin. Clickhaze hava sett sær sum málsetning, at fyrisitingin kring bólkin skal vera á eins høgum stigi, sum tónleikurin sjálvur.

Til tess at náa hesum eru tvey fólk knýtt afturat bólkinum: Sólarn Solmunde er settur at taka sær av management, samskipan o.ø., og Kristin Sæmundsson, vanliga nevndur Kiddi, er settur at taka sær av PR-átøkum, konsertum, distrubutión og sambandi við fjølmiðlar uttanlands. Á henda hátt er ætlanin at skipa fyrisitingararbeiðið betur og skipa soleiðis fyri, at tónleikararnir hava meira tíð og orku til at taka sær av tónleikinum.

**Dato:**
**1. juni**
Clickhaze heimasíða almennakunngjørd
**2. juni**
Stockholm, Norrmalmstorg kl. 16.00 (Stockholmholm 750 ára jubileums festival)
**14. juni**
Fløgan kemur út, útikonsert í Runavík saman við m.a. Týr (eystanstevna)
**26. juni**
Clickhaze á Roskilde festival, camping scene
**27. juni**
Clickhaze á Nibe festival, måneskinsteltet
**4. juli**
Clickhaze á Midtfyns festival
**19 juli**
Clickhaze á Gøtustevnu
**19. august**
Clickhaze á Nipiaa Rock festival, Grønland.



# Pedagogfelagið 20 ár

**Føroya Pedagogfelag fyllir í dag, 1. juni, 20 ár. Í sambandi við føðingardagin hevur felagið fingið Bárð Jákupsson at gera serligt steinprent til allar limir felagsins**

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Føroya Pedagogfelag fyllir í dag 20 ár. Í sambandi við føðingardagin hevur felagið fingið Bárð Jákupsson at gera serligt steinprent til allar limirnar, sum eru umleið 1100 í tali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá felagið varð stovnað fyri 20 árum síðani vóru bert 80 limir. Í dag liggur limatalið um 1100.

– Felagið varð av fyrstan tíð stovnað sum eitt áhugafelag hjá útbúnum pedagogum, sum komu heim frá útbúgving úr Danmark og Íslandi. Nú er felagið vorðið til eitt sjálvstøðugt felag við samráðingarrætti, greiðir Carita Björklund, formaður í Pedagogfelagnum frá.

Eitt av aðalmálunum hjá felagnum var av fyrstan tíð at fáa til hølvdar eina føroyska útbúgving, sum gjørdi tað møguligt hjá føroyingum at útbúgva seg í Føroyum.

– Og hetta hava vit megnað, og er hetta eitt av teimum heilt stóru stigunum hjá felagnum. Tann tørvurin, sum stóð í vøkstri tá, sum man sá, er veruleiki í dag.

Carita greiðir frá, at tá felagið varð stovnað vóru bara einir 3 ella 4 stovnar í Havnini. Í dag eru nógv fleiri stovnar og pedagogar. 1. juni í 1982 vóru bert eini tvey prosent av limunum mannfólk, og arbeiddu teir fyri tað mesta innan búst ovnaøki. Í dag eru 12 prosent av limunum mannfólk.

Til føðingardagin hevur pedagogfelagið fingið Bárð Jákupsson at gera serligt steinprent til limirnar, sum Grafiska verkstaðið hevur prentað. Hetta fyri at markera dagin á ein serligan hátt.

Annars verður opið hús í hølum felagsins í Tungugøtu í dag frá klokkan 14 til 17.

# Partabrævahækking á 15 mió. krónur

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Sparikassi*

Áhugin fyri at gerast ábyrgdari í Føroya Sparikassa í sambandi við umleggingina til partafelag, hevur verið sera stórur, og tá avtornaði, tann 5. apríl, vóru heilir 9743 ábyrgdarar skrásettir, ið tilsamans eiga góðar 25 milliónir krónur í ábyrgdarafæi. Til samanberingar vóru 6266 ábyrgdarar við árslok 2001, ið áttu tilsamans góðar 11 milliónir krónur í ábyrgdarfæi. Sostatt eru 3477 ábyrgdarar lagdir afturat í hesum árinum, og eru teknaðar 13,6 milliónir í ábyrgdarafæi.

Møguleiki var eisini fyri at tekna meira partapening, og hevur áhugin fyri hesum verið sera stórur. Av tí, at ábyrgdarpeningurin øktist munandi meira enn nevd og stjórn høvdu væntað, hevur nevndin í Føroya Sparikassa P7F gjørt av at nýta heimildina, ið nevndin hevur rætt til, og harvið hækka partapeningin.

Á nevndarfundið 17. mei, varð sostatt avgjørt at hækka tann útbjóðaða partapeningin við 15 milliónum krónum, soleiðis, at partabrævahækkingin tilsamans verður 40 milliónir krónur, umlagt ábyrgdarfæ íroknað.

Hækkingin er tó bert galdandi fyri teir ábyrgdarar, sum áðrenn 31. mei ynskja at leggja ábyrgdarfæ um til partapening.

Í hesum sambandi er eitt ískoytisprospekt gjørt, sum lýsir allar avgerandi broytingar, sum standast av hesari avgerðð nevndarinnar, umframt onnur týðandi viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri felagið. Ískoytisprospektið er at finna á okkara heimasíðu www.sparikassin.fo

Umleggingartilgongdin gongur annars sum væntað, og áhugin fyri at leggja um er stórur. Seinasta freist at leggja um var sum kunnugt í gjár.

# Bakaríið á Gripsvegnum snarar lykilin

**Gunnleivs Bakarí á Gripsvegnum í Havn snarar í dag lyklinum fyri seinastu ferð**

BAKARÍ
*Ingrid Bjarnastein*




*Gunnleivs Bakarí á Gripsvegnum snarar í dag lyklinum fyri seinastu ferð*

*Mynd: Finnur Justinussen*

– Virksemið er so lítið nú, at tað loysir seg ikki at hava handilin opnan, sigur Carl Mouritsen, stjóri á Gunnleivs Bakaríi.

– Aðrir handlar liggja so tætt uppá, og handilin vit hava á Hoyvíksvegnum er eisini nær við, so ov lítið av fólki vitjar handilin á Gripsvegnum. Eisini aðrir handlar, sum PE og SMS liggja í nærøkinum.

Seinasti dagur bakaríið hevur opið er í dag, leygardagin.

Carl Mouritsen sigur, at virksemið í bakarínum er minkað so við og við, so nú er valt at lata aftur. Starvsfólkini, ið arbeiða á Gripsvegnum, hava fingið arbeiðið aðrastaðni á virkinum.

Handilin á Landavegnum og á Hoyvíksvegnum fara framvegis at hava opið.

Bátastevnan 2002:

# Stór undirtøka

**Undirhúsið í Vestmanna skipaði seinasta vikuskifti saman við kappróðrarfelagnum hjá VÍF fyri stórari bátastevnu. Undirtøkan var sera góð og eru fyrireikararnir væl nøgdir við tiltakið**

BÁTASTEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

Stóra bátastevnan, sum var seinasta vikuskifti, fekk stóra undirtøku. Heilir 132 bátar luttóku á stevnuni, harav 54 lógu náttina yvir í Vestmanna. Á keiøkinum høvdu fyrireikararnir skipað fyri, at samarittarnir hjá Reyða Krossi gingu vakt og ansaðu eftir teimum bátunum, ið lógu við kei.

Um kvøldið varð skipað fyri dansi í ítróttarhøllini, har Country bólkurin í Klaksvík spældi. Frá fyrireikarunum frætta vit, at góð 700 fólk vóru til dansin.

Inn komu tilsamans 90.000 krónur, men tá eru útreiðslur og annað ikki roknað frá.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!